# Meira enn bert ein kroppur

Aftur í kvøld sat hon einsamøll í kamarinum. Stardi út í tóman heim. Alt sítt lív hevði hon følt, at hon ikki hoyrdi til. At tann, hon veruliga var, var ein byrða fyri tey rundan um hana. Ein leiklutur í einum borðspæli, sum var endaður í skeiva spælinum og ikki hoyrdi til, har hann var.

Hon streyk hárið afturum oyrað og hugdi í speglið. Suffaði við sjónini av sær sjálvari. Í kamarinum var blivið kvalið, so hon reisti seg at lata vindeygað upp. Heystið var komið. Hon lat køldu luftina stroyma inn, eygu hennara leitaðu sær út eftir, yvir um fjørðin.

Eitt ljóð kom frá fartelefonini. Eini sms-boð. Hon skundaði sær at taka hana upp og kanna, hvør hevði skrivað til hana so seint á kvøldi, hóast hon onkursvegna visti, hvør tað var. Hon ynskti, at hesaferð skuldi tað vera øðrvísi. Tá hon las navn hansara, gjørdi hjartað eitt lop.

“Ert tú farin í song?”

Hon fekk ikki eyguni av boðunum. Royndi at lesa hann av. Hvat vildi hann hesaferð? Hugsaði hann um hana? Í gjøgnum tað seinasta árið hevði hon lært, at hansara uppmerksemi kom og fór. Men tað var ongantíð av sonnum hennara. Tað var ringt at vita, hvar hon hevði hann, og hetta østi hana eitt sindur. Hóast hann fekk hana at føla seg virðisleysa og brúkta, sá hon fram til, tá ið hann skrivaði til hana.

Tey bæði høvdu verið í hesari støðuni í fleiri mánaðir nú. Ár kanska. Tað forholdið, sum tey høvdu, var í roynd og veru ikki eitt forhold. Tey bæði vóru á somu síðu um, hvar tey høvdu hvønn annan, og skiltu kenslurnar hjá hvørjum øðrum. Ella gjørdu tey?

Tey vóru ongantíð almenn. Har var í roynd og veru einki heiti fyri, hvat tey vóru. Ikki visti hon hví, men tað fylti hennara tørv onkursvegna. Tað hevði hon yvirtala seg sjálva um.

Hon hugdi enn at skíggjanum. Orðini “Ert tú farin í song?” skóru hana í eyguni.

Hvat skuldi hon skriva? Hon byrjaði, men slettaði tað aftur. Hon visti ikki heilt, hvussu hon skuldi orða seg. Tímdi ikki at ljóða for tøk, samstundis vildi hon leggja upp til, at hann skuldi spyrja hana um at fylgjast.

"Eg eri enn uppi."

Tað tók henni fleiri minuttir at svara honum, men eftir bert fá sekund hevði hann longu svarað.

"Kann eg koma heim til tín?"

Hjartað byrjaði aftur at duka. Hon tosaði við seg sjálva, royndi at siga við seg sjálva, at hetta bara fór at vera eitt vanligt kvøld, har tey bæði vóru saman. Hon segði við seg sjálva, at hetta hevði ongan týdning. Óansæð hvussu ofta hon endurtók orðini, var tað ein baktanki ið kom aftur og aftur til hana: Hvat vissi nú tað kundi vera okkurt meira?

Hon gekk runt í kamarinum, púra í villareiði. Var hetta nakað hon bilti sær sjálvari inn? Lat hon sítt lága sjálvsvirði hava eina ávirkan á, hvat hon gjørdi? Helt hon veruliga, at hann fór at síggja meira enn kropp hennara, at hann fór at síggja tann, hon veruliga var?

Hóast allar vinkonurnar ráddu henni frá at síggja ella kontakta hann aftur, so gjørdi hon ímóti ráðunum. Hon gav sær góða tíð at svara aftur.

"Ja, kom bara."

Aftaná tað sum føldist sum teir longstu 15 minuttirnir í hennara lívi, bankaði uppá hurðina. Hon lat varisliga upp. Har stóð hann. Við sínum fitta smílið.

Tey heilsaðu uppá hvørt annað. Hjartað hjá henni dukaði hart í bringuni. Fyri hvørt sekund sum fór, bleiv hon meira vitandi um, hvussu ósikkur hon var um hetta.

Tey søgdu mest sum einki at byrja við. Tey settust inn í kamari hjá henni. Tøgnin var sterk. Tey hugdu bert uppá hvønn annan. Hon ynskti so innarliga at tora at spyrja hann, hvat hetta var fyri nakað. Hvat tey vóru. Hon ræddist, hvat hann fór at svara. Hvat vissi hetta ongan týdning hevði fyri hann? Hon visti, at hann ikki skoytti so nógv um hana. Hann hevði ongantíð spurt, hvat hon ætlaði sær aftaná

miðnám. Hvat henni dámdi. Tað einasta hann visti, var hvussu vorðin hennara undirklæði vóru.

Hann skoytti ikki um, hvat fekk hana at flenna. Hvat kveikti hennara áhugað. Hann kendi hana onkursvegna ikki. Men tó visti hann hvørja stødd í brósthaldara hon brúkti. Hann var ikki her fyri hennara hjarta. Hann var bara her fyri kroppin.

Hann ringdi og skrivaði, sum honum lysti. Tá hann keddi seg og hevði brúk fyri kropsligari nærveru, tað var tá hann ringdi. Kensluliga tímdi hann ikki at hava samband við hana.

Hon visti hetta væl, men hvørja ferð hann bankaði upp á hurðina, lat hon upp og gav honum júst tað, ið honum manglaði. Ikki tí hon vildi, hon dugdi bara ikki at siga nei.

Tá tey vóru saman, virkaði hann veruliga til at leggja í hana. Soleiðis fekk hann hana at føla tað. Hann streyk henni um hárið,  Kíndi enninum spakuliga. Hugdi í eygu hennara. Mussaði hana.

Men tó, hesi tingini gjørdi hann við skundi. Hann skuldi altíð meira. Sum um hann ikki fekk bíðað, til hon gav honum tað, ið hann vildi hava.

Sjálvt um hon ikki vildi hava hetta slagið av forholdi, ið tey høvdu, so vildi hon enn hava hann. Og hon vildi gera alt fyri at hava hann verandi.

Aftaná tey høvdu ligið saman, reisti hann seg stundisliga upp.

“Eg verði noyddur at fara, nú er so seint ha?”

Hon ballaði seg undir dýnuna. Nikkaði og smíltist veikt. Hann kysti hana skjótt á munnin og fór sína leið.

Hjartað sakk í búkin. Soleiðis var tað hvørjaferð. Men hvørjaferð vónaði hon so innarliga at næstu ferð skuldi vera øðrvísi. Men soleiðis bleiv ongantíð.

Dagar gingu, og hon hoyrdi einki frá honum. Als einki. Tá enn fleiri dagar vóru farnir um bak, fekk hon aftur eini boð á fartelefonina.

“Skulu vit fara at gera okkurt skjótt?”

Hon hugdi leingi at boðunum. Aftur hesaferð kravdi hann bara kroppin hjá henni. Hon føldi seg brúkta. Valini, sum hann hevði noytt hana at taka, sum hon nú angraði. Hon visti, at hon var noydd at lata hann fara. Hon visti, at tað var tíð

uppá, at hon fór at elska seg sjálva nóg nógv til at lata hann fara. Tí hon var meira enn kroppurin hjá sær.

Men henni longdist eftir hesari kærleikskensluni, sum hon einans føldi saman við honum.

Hon tók telefonina og byrjaði at skriva.